# Dagrøktari

**til dagrøktina á Skála**

Runavíkar Kommuna søkir eftir dagrøktara at byrja 15.11.2006.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal verða soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 586004.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi seinast mikudagin 1. november 2006.

RUNAVÍKAR KOMMUNA.

**Dagrøktin á Skála**
Bryggjan 2
480 Skála

Føroya Handilsskúli á Kambsdali søkir eftir

# lærarum

Talan er um tvey størv. Annað í marknaðarførslu C, samfelagslæru C og virkisbúskapi C og hitt í støddfrøði D/C/B.

**Arbeiðsuppgávur:**
- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir
- luttaka í toymisarbeiði
- vera við í ráðlegging skúlans
- luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á A- og B-stigi.
- hevur viðkomandi útbúgving á bachelor-stigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á C-stigi.
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við at menna skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

**Vit kunnu m.a. bjóða:**
- eitt fakligt mennandi umhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag

**Løn:**
Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla á Kambsdali, 530 Fuglafirði. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 3. november 2006.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Páll Isholm, deildarstjóra, á telefon 444900/219930 ella palli@kambsdal.olivant.fo



# Arbeiðsleiðari til Tvøroyrar Kommunu

Tvøroyrar Kommuna søkir eftir arbeiðsleiðara til anleggsdeildina.
Tekniska deild ætlar at menna anleggsdeildina, við at fáa arbeiði í sambandi við viðlíkahald og nýgerð av vegum, kloakkum, reinhald, fríðkan av økjum v.m. hjá kommunini, lagt í eina fast skipan.

**Arbeiðsuppgávur**
Undir leiðslu av teknisku deild, fyriskipar og røkir arbeiðsleiðarin hesar uppgávur:
- stendur fyri og hevur rakstrarábyrgdina av viðlíkahaldi og útbygging av anleggsdeildini
- hevur dagligu leiðsluna av viðlíkahaldi og nýgerð av vegum, kloakkkervinum, fríðkan av økjum, reinhaldi v.m. um hendi
- hevur umsitingarligu ábyrgdina av amboðum, maskinum o.a. ið eru knýtt at anleggsdeildini
- luttekur í skráseting av vegum og kloakkleiðingum

Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Fakligir eginleikar**
Vit vænta, at tú hevur viðkomandi fakligan kunnleika og arbeiðsroyndir til anleggsarbeiðir. Tað er ein fyrimunur at tú eisini hevur royndir innan betongarbeiði. Tað er ikki ein treyt at tú hevur sveinabræv. Tú skalt hava koyrikort.

**Persónligir eginleikar**
Vit ynskja, at tú ert røkin, málsøkjandi, fyrikomandi, hevur leiðsluroyndir og gongur undan í at menna tænastustøðið, dugir væl at fara við starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast tilber og verður sett sambart sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri fæst at vita**
Um starvið við at venda sær til Tummas Sørensen, býarverkfrøðing, tlf. 371085.

**Umsóknir**
*Saman við møguligum viðmælum, avritum av møguligum prógvum og upplýsing um royndir, skal vera Tvøroyrar Kommunu, Postboks 80, FO 800 Tvøroyri, í hendi, viðmerkt "arbeiðsleiðari til Tvøroyrar Kommunu", í seinasta lagi hósdagin 2. november 2006.*

TVØROYRAR KOMMUNA

## BÁTUR TIL SØLU

Áttamannafar / vovlo penta 25 Hk. Fr-bygdur
Línuspæl – línurennu / kippara / Rullu
2 hydr: snellir- Vhf - Pappír ekkolodd
Og alla lógarkravda úrgerð. So sum
Kumpass – segl- eldsløkkjara – floytu-
Rakettir – bluss – radarreflex
Fínur at fara við 3-4 stampum.

**Báturin hevur fiskiloyvið, og er bíliga til sølu.**

**Ring 268716 ella 456716**

# Bilførari til IRF

Søkt verður eftir einum bilførara til Bjølluvísu, at byrja skjótast gjørligt. Bjølluvísa er ein fýraakslaður bilur við skiftilastskipan, sum koyrir bæði við komprimaturaggregati, lastum og bingjum.

**Arbeiðið umfatar:**
1. heintan av burturkasti frá virkjum og bingjuplássum v.m. í limakommununum hjá IRF
2. annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF.

**Krøv til umsøkjaran:**
1. Stóra koyrikortið, og vanur at koyra lastbil
2. Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt
3. Skal vera kundavinarligur og nágreiniligur við útfylling av fylgiseðlum o.t.
4. Skal vera røkin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF á telefon **41 42 43**, Adelbert Ellingsgaard.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan fríggjadagin 27. oktober 2006.

IRF
Postboks 39
FO-520 Leirvík

# Hús á Argjum til sølu

Um nøktandi boð fæst, verða hús okkara á Argjum seld. Húsini standa í barnavinarligum umhvørvi og nær við skúlan.

**Tlf. 26 34 54**